KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 22.06.2017 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen.

Varalimir: Kjartan á Gravarbø møtti fyri Óla M. Lassen og Jóhann Lützen møtti fyri Steinbjørn O. Jacobsen

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Nevndarskrivari: Maria Thorsteinsson, journalleiðari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
51/17	17/00662-8	Býráðslimur burturstaddur - Óli M. Lassen
52/17	17/00754-5	Býráðslimur burturstaddur - Steinbjørn O. Jacobsen
53/17	15/00945-37	Bústaðatilboð til persónar við víttfevndum sosialum trupulleikum
54/17	17/00457-3	Frámatrikulering við Oyrarveg - matr. nr. 1618, Norðoyri
55/17	17/00505-3	Barnatannrøktin - hølisviðurskifti - *fyrra viðgerð*
56/17	15/00659-15	Tørvur á nýggjum serflutningsbussi - *fyrra viðgerð*
57/17	17/00109-1	Eykajáttan: Vindskaðar 2016/17 - *fyrra viðgerð*
58/17	17/00071-47	Nýggj dagstovnaeind - Fjallafípan - flyting millum kontur - *seinna viðgerð*

Til viðgerðar

51/17
17/00662 Býráðslimur burturstaddur - Óli M. Lassen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	22.06.2017	51/17	

Frágreiðing um málið:

Óli M. Lassen, býráðslimur, hevur boðað borgarstjóranum frá, at hann verður burturstaddur í juni mánaða og fær tí ikki møtt til býráðsfundin 22. juni 2017. Hann biður samstundis um, at næstvaldi á valevnislistanum fær fundarboð til býráðsfundin. Næstvaldur á listanum er Kjartan á Gravarbø.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin (KSL), grein 18, stk. 2:

> *Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*

KSL, grein 18, stk. 3:

> *Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til varalimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at næstvaldi á valevnislistanum fær loyvi at taka sæti í býráðnum á fundinum 22. juni 2017 fyri Óla M. Lassen.

Býráðsins samtykt 22-06-2017
Tilmælið einmælt samtykt, og Kjartan á Gravarbø tók sæti í býráðnum.

52/17
17/00754 Býráðslimur burturstaddur - Steinbjørn O. Jacobsen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	22.06.2017	52/17	

Frágreiðing um málið:
Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur, hevur boðað frá, at hann hevur lógligt forfall til býráðsfundin 22. juni 2017 og ynskir, at næstvaldi á valevnislistanum fær fundarboð í staðin.
Sambært skrivi frá Valnevndini, 9. nov. 2016, er næstvaldi á valevnislistanum Óluva Klettskarð, men henni berst frá at møta á fundinum; annar næstvaldi á valevnislistanum er Jóhann Lützen.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 18, stk. 1 og stk. 3.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at annar næstvaldi á valevnislistanum fær loyvi at taka sæti í býráðnum á fundinum 22. juni 2017 fyri Steinbjørn O. Jacobsen.

Býráðsins samtykt 22-06-2017
Tilmælið einmælt samtykt, og Jóhann Lützen tók sæti í býráðnum.

53/17
15/00945 Bústaðatilboð til persónar við víttfevndum sosialum trupulleikum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	13.06.2017	10/17	
2 Fíggjarnevndin	20.06.2017	75/17	
3 Klaksvíkar Býráð	22.06.2017	53/17	

Frágreiðing um málið:
Seinast, málið var fyri í trivnaðarnevndini eldri og bústaðir, var 14. mars 2017, har "nevndin samtykti at geva umsitingini heimild til at arbeiða víðari við málinum, útfrá tí fortreyt, at kommununnar partur verður, sum lýst er í málinum".

Á fundinum kom fram, at Umsorganarheimið Gloria hevur gjørt eitt fyrsta uppskot til árliga fíggjarætlan:

Lønir	kr. 3.712.362
Rakstur	kr. 733.600
Leiga	kr. 360.000
Tilsamans	kr. 4.805.962
Egingjald	kr. -200.000
Netto	**kr. 4.605.962**

Víðari varð staðfest, at miðað verður ímóti á leið hesum býti av kostnaðinum millum avvarðandi myndugleikar, har mælt verður til, at Almannamálaráðið ber størra partin av rakstrarkostnaðinum, vísandi til, at hetta málsøkið er ábyrgd landsstýrissins sambært galdandi lóggávu, har tað eitt nú er ásett, at *landsstýrismaðurin kann skipa ella góðkenna serlig bútilboð* (§ 32e í forsorgarlógini):

Almannamálaráðið	kr. 3.000.000
Klaksvík kommuna	kr. 1.605.962
SAMANLAGT	kr. 4.605.962

Á fundi við landsstýriskvinnuna í Almannamálaráðnum 9. mars 2017 vísti landsstýriskvinnan vælvild ímóti hesum ætlaða heimi fyri persónar við víttfevndum sosialum trupulleikum, men hon vísti samstundis á, at tað ikki kundi roknast við meira av árligum rakstrarstuðuli frá landinum enn 2 mió. kr., við tað at hetta er upphæddin, sum verður latin øðrum líknandi heimum frammanundan.

Fundurin við landsstýriskvinnuna endaði við tí avtalu, at kommunan og NBH skuldu royna at koma við uppskoti um írestandi fíggingina, sum var íalt 1 mió. kr.

Okkara fyrsta roynd var at royna at fáa kommunurnar í norðurøkinum at luttaka fíggjarliga í hesum. Skriv vórðu send Fugloyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Kunoyar, Eystur- og Fuglafjarðar kommunum, og eftirfylgjandi vórðu samrøður og fundir við fleiri teirra, men tíverri hevur tað víst seg, at hetta ikki er gongd leið.

Við støði í hesum hava vit saman við stigtakarunum hugt kritiskt at rakstrarætlanini fyri heimið við tí fyri eyga at finna sparingar, og er tað eydnast okkum at lækka raksturin við 400.000 kr.

Okkara uppskot er tí, at tær 600.000 kr., sum við hesum resta í árliga rakstrinum, verða útvegaðar soleiðis:

- Klaksvíkar kommuna økir sítt gjald við 200.000 kr. Sambært borgarstjóranum og nevndarforkvinnuni eru útlit fyri, at hetta kann lata seg gera.

- Landsstýriskvinnan í almannamálum útvegar 200.000 kr. afturat.

- Egingjaldið frá búfólkunum verður økt, soleiðis at hetta gevur umleið 200.000 kr. meira til heimið. Hetta verður skotið upp, vísandi til, at persónarnir í hesum málbólki fáa hægri pensjón og gjalda, sum er, minni enn búfólk á eldrastovnum.

Ein samanbering av einum fólkapensjónisti við lægstu pensjón og einum við lægstu fyritíðarpensjón vísir, at fyritíðarpensjonisturin fær uml. 3.000 kr. meira útgoldið um mánaðin.

Fólkapensjón	
Grundupphædd	3.589
Viðbót	3.771
	7.360

Fyritíðarpensjón	
Grundupphædd	6.030
Lægstu viðbót	1.474
Eyka viðbót	2.840
	10.344

Hetta hendir samstundis, sum fólkapensjonisturin rindar millum góðar 1.400-1.800 kr. meira um mánaðin fyri bústað.

Egingjøld fyri bústað	
Eldrabústovni	5.686
Bútilboð til heimleys § 11 stk. 2	3.872
Bútilboð til heimleys § 11 stk. 3	4.230

Upphæddirnar omanfyri eru soleiðis útgreinaðar í gjald fyr bútilboð og eyka gjald fyri kost:

Egingjald fyri serlig bútilboð fyri heimleys		
	kr.	
Serlig bútilboð fyri heimleys, § 11, stk. 2	1.840,00	(mánaðarliga)
Eyka fyri kost í mesta lagi	2.032,00	(mánaðarliga)
Serlig bútilboð fyri heimleys, § 11, stk. 3	2.198,00	(mánaðarliga)
Eyka fyri kost í mesta lagi	2.032,00	(mánaðarliga)

Roknað út frá http://av.fo/default.asp?page=670 og http://www.logir.fo/Kunngerd/126-fra-17-12-2014-um-heimataenastu-og-gjald-fyri-heimataenastu-eldrarokt-oa

Við støði í hesum hava vit nú biðið landsstýriskvinnuna um ein skjótan fund aftur um hetta mál, sum vit meta at vera áleikandi at fáa sett í verk skjótast møguliga, tí persónar við víttfevndum sosialum trupulleikum eru her í lokalsamfelagnum, sum hava akuttan tørv á bústaði.

Enn hava vit ikki frætt aftur frá Almannamálaráðnum um fund, sum væntandi verður ein av fyrstu døgunum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 31 frá 30. apríl 2007 um broyting í lóg um almenna forsorg:

"Serlig bútilboð

§ 32 e. Til persónar við víttfevndum sosialum trupulleikum, sum ikki eru førir fyri at útvega sær ella fasthalda ein varandi bústað, kann landsstýrismaðurin skipa ella góðkenna serlig bútilboð.
Stk. 2. Serlig bútilboð kunnu skipast í samstarvi við sjálvbodnar felagsskapir.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur um rakstur av serligum bútilboðum, herundir reglur um upptøku og gjald fyri uppihaldi."

Fíggjarligar avleiðingar:
Sí viðmerkingarnar í omanfyri standandi frágreiðing um málið, har tað framgongur, at tørvur er á at hækka kommunala gjaldið til raksturin av hesum heimi við 200.000 kr., úr 1,6 mió. kr. og upp í 1,8 mió. kr.

Um undirtøka verður fyri hesum ætlaða heimi, er ætlanin, at tað skal lata upp í heyst, og kann tá roknast við umleið einum triðingi av omanfyri nevnda kostnaði í inniverandi ári.

Tilmæli:
Málið verður við hesum lagt fyri nevndir og býráð við tilmæli um undirtøku fyri, at hetta mál verður sett í verk sambært tí í hesum skrivi lagda leisti, har kommununnar heilárligi partur at rinda verður 1,8 mió. kr., og at neyðuga játtanin í inniverandi ári á 600.000 kr. verður játta hesari verkætlan sum eykajáttan.

TrN Eldri & Bústaðir 13-06-2017:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, tó soleiðis at verkætlanin fer í gongd 1. januar 2018, og at fíggingin verður tikin upp í fíggjarætlanina fyri 2018

FíN 20-06-2017
Nevndin tekur undir við E&B 13-06-2017.

Býráðsins samtykt 22-06-2017
Tilmælið frá FíN 20-06-2017 eimælt samtykt.

54/17
17/00457 Frámatrikulering við Oyrarveg - matr. nr. 1618, Norðoyri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	12.06.2017	46/17	
2 Klaksvíkar Býráð	22.06.2017	54/17	

Frágreiðing um málið:
Vístverður til skriv frá borgara, dagf. 17.03.2017.
Byggisamtyktarliga er talan um lendi í økisparti A9, við høvuðsásetingini: Bústaðarøki
Undirásetingar eru m.a.:
Byggjast skal sambært Serstakari Byggisamtykt (ongin Serstøk Byggisamtykt fyriliggur fyri økið)
Grundøkjavídd kann í mesta lagi vera 300 m^2. (Umsóknin frá borgaranum leggur upp til grundøki upp á uml. 1000 m^2.
Skal umsóknin hjá borgaranum kunna gangast á møti, má sostatt

- ásetingin um mesta mark grundøkjavídd í Almennu Byggisamtyktini broytast, samstundis sum gerast má uppskot til og samtykkjast Serstøk byggisamtykt fyri alt A9-økið,
- ella mugu verandi ásetingar um krav til Serstaka Byggisamtykt fyri alt A9-økið broytast.



Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Er vilji til at loyva sethúsabygging framvið niðaru síðu av landsvegnum eftir sama prinsippi sum á økinum sunnanfyri (matr. nr. 961b, 961c, 961f og 961g), metir Tekniska Umsiting hetta kann lata seg gera við einum ískoyti til undirásetingina, sum – galdandi fyri vanlig sethús – í tí føri verður soljóðandi:

- *Vanlig sethús: ja, framvið niðaru síðu av landsvegnum – annars sambært Serstakari Byggisamtykt.*

og áseting av minstu grundøkjavídd soleiðis:

- *Grundøkjavídd: í minsta lagi 200 m^2 og í mesta lagi 300 m^2, tó framvið landsvegnum í mesta lagi 1000 m^2.*

Við tað at talan er um lendið framvið landsvegnum, har byggilinjan er munandi longri frá vegnum enn framvið kommunalum vegi, metir umsitingin ikki, at eitt slíkt ískoytið nýtist at nerva høvuðsintentiónina við A9-økinum stórvegis, sum við hesum framhaldandi stendur opið fyri eini komandi Serstakari Byggisamtykt galdandi fyri partin omanfyri vegin, niðara partin av matr. nr. 961a og sermerkta grótlendið í matr. nr. 1618, sum markar móti viðalundini.

Verður samtykt at broyta økisásetingina fyri A9, sum lýst omanfyri og við tí fyri eyga at skapa heimild fyri frábýti av grundøki sambært umsókn, mælir Tekniska Umsiting til

- at nýggja grundøkið verður staðsett í økisparti A9 - í landnyrðingshorninum av matr. nr. 1618. Trygd má tó veitast fyri, at staðsetingin ikki stríðir ímóti møguligari atkomu frá landsvegi til restina av økinum

og at málið verður framt treytað av

- at Klaksvíkar kommuna fær til keyps tann partin av matr. nr. 1618, sum liggur innanfyri økispart D1 (uml. 490 m^2 – litað við gulum á kortinum omanfyri)
- at neyðugt lendi fæst til keyps frá matr. nr. 1618 til atkomuveg til samlaða økið
- at góðkenning fæst frá Landsverk til íbinding í landsveg.

Málið verður við hesum sent nevnd og býráði til støðutakan, um arbeiðast skal fram ímóti eini byggisamtyktarbroyting sum lýst omanfyri.

UBN 12-06-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 26-05-2017.

Býráðsins samtykt 22-06-2017

Kristian Eli Zachariasen legði broytingaruppskot fram á býráðsfundinum, um at beina málið aftur í nevnd.

Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Kjartan á Gravarbø og Beinta Klakstein, taka undir við broytingaruppskotinum.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Jóhann Lützen taka ikki undir við broytingaruppskotinum.

55/17
17/00505 Barnatannrøktin - hølisviðurskifti - fyrra viðgerð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	13.06.2017	31/17	
2 Fíggjarnevndin	20.06.2017	70/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	22.06.2017	55/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	28.09.2017		

Frágreiðing um málið:
Tað hevur í nógv ár verið ein sannroynd, at høliskarmarnir hjá Barnatannrøktini eru alt ov trongir til tað virksemi, starvsfólk og stóra talið av viðskiftafólkum, sum hava sína dagligu gongd har.

Tí var tað ein stórur lætti, at nevndir og býráð fyri stuttum tóku undir við, at Gigni á Skúlatrød í løtuni flytir úr hølunum við síðuna av Barnatannrøktini og niðan í leiguhølir í Heygabúðini, har Gigni fer at verða, til klárt verður at flyta omanaftur á Skúlatrød – ætlandi um eini 5 ár ella so.

Henda flyting av Gigni letur upp fyri tí leingi væntaðu og ógvuliga tilgongdu víðkanini av hølunum hjá Barnatannrøktini, og tað er í hesum sambandi, at hetta tilmæli verður skrivað.

Umsitingin hevur samskift við Teknisku Umsiting, byggifulltrúan og við Svend Sivertsen, arkitekt hjá Fuglak, ið samskipar stóru skúlabyggingina á Skúlatrød. Í hesum samskifti er staðfest, at tað er í tráð við heildarbyggiætlanina á Skúlatrød, at Barnatannrøktin verður verandi á sama staði í bygninginum, har hugsanin er at innrætta hølini, so allar tær heilsuligu tænasturnar á Skúlatrød verða savnaðar her.

Sostatt er ein víðkan og lutvís dagføring av hølunum hjá Barnatannrøktini í tráð við byggiætlanina fyri Skúlatrød, við tað at bæði Barnatannrøktin og ætlandi eisini Gigni í framtíðini koma at verða verandi í hesum partinum av skúlabygningunum, har tað eisini verður lagt upp til og góðir møguleikar fyri felags gagnnýtslu av fundar- og undirvísingarhølum v.m. Gigni kann tó ikki fáa atgongd síni endaligu høli, fyrr enn træsmíð v.m. er flutt út haðani.

Ein íløga í eina samanbinding og nakrar ábøtur á verandi hølir hjá Barnatannrøktini er sostatt ein endalig loysn fyri Barnatannrøktina, sum ikki verður neyðug at endurtaka seinni í samband við byggingina á Skúlatrød.

Gjørd er ein ávegis skitsutekning fyri ætlaðu hølisbroytingarnar, sum við nøkrum broytingum nú er góðkend av byggifulltrúanum – sí mynd:



Hans Fróði Hansen, byggifrøðingur, hevur fingið avtalu við Birgir Joensen, skúlatænara, sum vil átaka sær at standa fyri arbeiðnum at fremja hesar hølisbroytingar, har ætlanin er at fáa menn hjá kommununi at luttaka í arbeiðnum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt, sum broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 6. mai 2014, hevur eitt nú hesar ásetingar:
§ 2. Kommunustýrið skal tryggja øllum børnum og ungum undir 18 ár, sum búgva í kommununi, møguleika fyri ókeypis fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøkt.
§ 8. Kommunurnar bera tær útreiðslur, sum standast av kommunalu tannrøktini sambært § 2.

Fíggjarligar avleiðingar:
Hans Fróði Hansen upplýsir, at hann – saman við Birgir Joensen – metir, at hesar hølisbroytingar kunnu fremjast fyri samanlagt kr. 500.000.

Tilmæli:
Mælt verður nevndum og býráð til at taka undir við, at hesar alneyðugu hølisábøtur verða framdar nú, og vísandi til, at hetta er ein partur av heildarætlanini fyri skúlabyggingina á Skúlatrød, sum við hesum verður framskundaður nakað, verður mælt til, at kostnaðurin á hesum arbeiðið, sum er mettur til kr. 500.000, verður fíggjaður av íløguavsetingini til skúlabyggingina á Skúlatrød – hetta vísandi til, at talan er um somu skúlabygningar og heildarætlan.

13.06.17 Trivnaðarnevndin Børn & Ung:
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 07.06.17.

FíN 20-06-2017
Nevndin tekur undir við B&U 13-06-2017.

Býráðsins samtykt 22-06-2017
Tilmælið frá FíN 20-06-2017 eimælt samtykt.

56/17
15/00659 Tørvur á nýggjum serflutningsbussi - fyrra viðgerð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	13.06.2017	8/17	
2 Fíggjarnevndin	20.06.2017	74/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	22.06.2017	56/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	28.09.2017		

Frágreiðing um málið:
Hetta málið var fyri tíðliga í 2016, og tá varð samtykt at seta av pening til nýggjan serflutningsbuss í fíggjarætlanini fyri 2017. Tó sæst ongin avseting til hetta endamál í 2017.

Bussurin, sum verður nýttur til serflutning, er eftirhondini 13 ára gamal, og tað hevur tær fylgjur, at hann ofta endar á verkstaði til umvælingar í úrtíð, og tá má annar bussur útvegast ístaðin, sum hevur lyftu til koyristólar, og tað er ikki altíð líka lætt.

Bussurin varð í januar 2017 lýstur at vera uppslitin og illa tærdur av rusti. Sí slóð til myndir, januar 2017: https://photos.google.com/share/AF1QipNYgoMdCvKPO_yugEsYzkGHGQWI4aNhd3hmMMNoBm4PSs4V43heXM9K1th7OepiTg?key=MmdUamtXRlJTVlhfRlpocmJzaXdGRk8tcml1RjBB

Jan Harris Askham, bilmekanikari og smiðjumeistari hjá kommununi, hevur ofta umvælt serflutnings-bussin, tá ið ábøtur hava verið neyðugar. Eftir áheitan frá umsitingini hevur Jan gjørt hesa støðulýsing og niðurstøðu í 2016:

> Viðvíkjandi Serflutningsbussinum hjá Klaksvíkar kommunu hevur smiðjan saman við tilbúgvingarleiðaranum og bussføraranum gjørt eina meting av, hvørjum standi Serflutningsbussurin er í. Vit hava hugt eftir øllum bussinum, og kunnu nógv brek ávísast.
>
> Bussurin er frá 2004, og koyrir hann ca. 8-10 tímar hvønn gerandisdag, hann er vorðin ov gamal, og eisini kann síggjast á honum, at hann er sera illa rustaður. Eisini er hann rustaður á hol í støðum. Tað kunnu eisini ávísast fleiri mekanisk brek á bussinum, og mett verður, at bussurin verður ov dýrur at umvæla, og er hetta ikki ráðiligt fyri ein so gamlan buss.
>
> Vit mæla tí til, at kommunan ger íløgu í nýggjan buss sum skjótast, tí at verandi bussur er í ógvuliga slitnum standi og harvið ógvuliga dýrur í viðlíkahaldi. Hetta stendur bara við og versnar vegna aldurin og brúkið.

Serflutningsbussurin í Klaksvíkar kommunu hevur sera nógvar brúkarar, sum hava tørv á hesi tænastu, og sum er grundarlagið undir, at tey kunnu hava eitt virkið gerandislív.

Vit eru farin undir eina tilgongd at skipa Serflutningin undir NBH, tí tørvur er á at víðka tilboðið til aðrar kommunur í tí samstarvinum. Ætlandi verður umsókn um hetta í næstum send Almannamálaráðnum, sum eisini rindar ein part av dagliga rakstrinum hjá Serflutningsskipanini.

Vegna støddina vil Klaksvíkar kommuna, óansæð broytingar, verða tann kommunan, sum ber meginpartin av kostnaðinum, tá ið nýggjur bussur skal keypast.

Vit hava áður fingið upplýst, at ein nýggjur bussur kostar uml. 800.000,- kr, men fyri stuttum sendi Finn Hansen umsitingini sølulýsing av bussi, sum er meinlíkur honum, vit hava í dag. Hesin er frá 2016 og stendur til sølu fyri kr. 424.900 +mvg. Sí hjálagda undirskjal við lýsing av bussinum.

Trivnaðarøkið hevur ikki tøkan pening at vísa á í inniverandi fíggjarári, og tí verður mælt til at fíggja keyp av nýggjum bussi við eini eykajáttan.

Lógargrundarlag:
"Reglugerð fyri Serflutningsskipan Landsins", sum eftir umsókn frá Klaksvíkar kommunu er sett í gildi av Almannamálaráðnum, regulerar hesa skipanina.
Reglugerðin er m.a. soljóðandi:

ALMANNA – OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Grein 7

Fígging:
Serflutningsskipan landsins verður fíggjað av landskassanum, kommununum og brúkarunum. Brúkarin rindar eitt brúkaragjald á 10 kr. fyri hvønn túrin, meðan restkostnaðurin verður býttur javnt millum land og tær luttakandi kommunurnar.

Landskassaparturin verður síðan útgoldin sambært góðkendari fíggjarætlan sum eitt a conto gjald tvær ferðir um árið. Uppgerð fyri fyrstu 6 mánaðirnar skal sendast Almannamálaráðnum í seinasta lagi 10. august, meðan uppgerð fyri undanfarna ár skal verða Almannamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 1. mars.

Kommunurnar senda ein grannskoðaðan roknskap fyri hvørja serflutningsskipan sær til Almannamálaráðið innan 15. mars.

Eisini skulu kommunurnar innan 1. februar senda eina fíggjarætlan fyri næsta árið, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna.

Sum tað framgongur, so inniheldur reglugerðin onga áseting um fígging av íløgu í nýggjan buss, men upp á fyrispurning upplýsir Almannamálaráðið fyri umsitingini, at íløgur fella 100% til kommununa at rinda. Ein áseting um hetta fer at verða tikin við í komandi dagføring av reglugerðini.

Sostatt er hetta ein íløga, sum kommunan verður at bera.

Fíggjarligar avleiðingar:
Sambært hjáløgdu sølulýsing er prísurin fyri ein nýggja serflutningsbuss kr. 424.900 +mvg.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyri standandi støðulýsing av serflutningsbussinum, verður málið við hesum lagt fyri politisku skipanina til kunningar og við áheitan um viðgerð við vælvild, soleiðis at útvegir kunnu finnast fyri, at ein nýggjur serflutningsbussur skjótast møguliga kann verða keyptur.

TrN Eldri & Bústaðir 13-06-2017:

Nevndin samtykti, at nýggjur bussur kann keypast, treytað av, at hann lýkur neyðug krøv fyri serflutning, og at keypið verður fíggjað við eykajáttan. Eisini verður heitt á umsitingin um at venda aftur við málinum um framtíðarskipan av økinum í samstarvi við NBH.

FíN 20-06-2017
Nevndin tekur undir við E&B 13-06-2017.

Býráðsins samtykt 22-06-2017
Tilmælið frá FíN 20-06-2017 eimælt samtykt.

57/17
17/00109 Eykajáttan: Vindskaðar 2016/17 - fyrra viðgerð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	12.06.2017	45/17	
2 Tekniska Nevnd	24.05.2017	27/17	
3 Fíggjarnevndin	20.06.2017	76/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	22.06.2017	57/17	
5 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	28.09.2017		

Frágreiðing um málið:
Um jólahalguna í 2016 var fleiri ferðir av ringasta veðri við nógvum vindi upp í stormstyrkið.
Avleiðingin av tí ringa veðrinum var, at stórir vindskaðar hendu ymsastaðni í býnum, og ein stór upprudding og umvæling stóðst av hesum skaðum.
Vegadeildin var við til hesa upprudding, og seinni var vegadeildin eisini við til at umvæla nakrar av teimum skaðum, sum stóðust av tí ringa veðrinum. Fyri tað mesta var tað træverk, sum vegadeildin umvældi.
Higartil er alt uppruddingar- og umvælingararbeiðið bókað av kontoini *Gøtusóping og reinhald*, meðan keyp av tilfari er bókað av kontoini *Umhvørvi*. (Sí viðheft)
Eitt stórt arbeiði er eftir at fremja, og tað er grótlaðing og træverk niðanfyri gomlu Shell-støðina, sum fórst illa av tí ringa veðrinum.
Karl Heri Joensen er biðin um at umvæla tann skaðan, og hevur hann mett kosnaðin av tí til uml. 150.000 kr.

Tað sum er bókað av kontoini *Gøtusóping og reinhald* er:	92.112 kr.
Tað sum er bókað av kontoini *Umhvørvi* er:	22.117 kr.
So samlaða umbøn til eykajáttan er:	264.229 kr.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
TU mælir til eykajáttan vísandi til vanliga arbeiðsgongd hjá Kl. kommunu seinastu mongu árini.
Mælt verður til eina broyting av fíggjarætlanini fyri 2017, har raksturin hækkar við kr. 264.229.
Mælt verður til at fíggja eykajáttanina av tøkum peningi hjá kommununi.

Tilmæli:

Mælt verður til at játta kr. 92.112 til kontoina *Gøtusóping og reinhald*, kr. 22.117 til kontoina *Umhvørvi*, og kr. 150.000, til *Vegir rakstur*, sum skal fíggja skaðan niðanfyri gomlu Shell-støðina.

UBN 12-06-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 13-03-2017.

TN 24-05-2017:
Málið verður tikið upp í samband við eykajáttanir seinni í ár.

FíN 20-06-2017
Nevndin tekur undir við UBN 12-06-2017.

Býráðsins samtykt 22-06-2017
Tilmælið frá FíN 20-06-2017 eimælt samtykt.

58/17
17/00071 Nýggj dagstovnaeind - Fjallafípan - flyting millum kontur - onnur viðgerð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	23.05.2017	25/17	
2 Fíggjarnevndin	30.05.2017	54/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	01.06.2017	48/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	22.06.2017	58/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð viðgjørt av býráðnum tann 1. juni 2017.

TrN B&U 23-05-2017:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 16-05-2017

FíN 30-05-2017
Nevndin tekur undir við B&U 23-05-2017.

Býráðsins samtykt 01-06-2017
Tilmælið frá FíN 30-05-2017 einmælt samtykt.

Býráðsins samtykt 22-06-2017
Eimælt samtykt við seinnu viðgerð.